Landsbanki Føroya

# Skjal B Íløgukarmar fyri landskassan, november 2024

**Max korrigeraði varleiki fyri íløgurøðina er 4**

| | | Karmar fyri aktivklassa | Hámark fyri einstakan mótpart |
|---|---|---|---|
| 1 | **Grundøki og bygningar** | **0** | |
| 2 | **Onnur dóttirfeløg** | **0** | |
| 3 | **Kapitalpartar (partabrøv)** | **15-35** | 2 |
| | Listaði partabrøv | 15-35 | |
| | Ólistaði partabrøv | 0-5 | |
| | Menningarlandapartabrøv | 0-5 | |
| 4 | **Lánsbrøv** | **0-85** | |
| 4.1 | Ríkislánsbrøv | 0-85 | |
| 4.2 | Realkredittlánsbrøv | 0-85 | |
| 4.3 | Indekslánsbrøv | 0-10 | |
| 4.4 | Kreditlánsbrøv, investment grade | 0-15 | |
| 4.5 | Kreditlánsbrøv, lægri enn investment grade | 0-25 | |
| 4.6 | Onnur lánsbrøv | 0-10 | |
| 5 | **Lán við trygd í fastari ogn** | **0-5** | 5 |
| | Lán til infrakervi | 0-5 | |
| 6 | **Onnur fíggjarlig aktiv** | **0-85** | |
| | Peningastovnskontur | 0-85 | |
| | Hedge fondar, infrakervi og aðrar alternativar íløgur | 0-15 | 2 |
| 7 | **Avleidd fíggjarlig amboð (derivat: optiónir, futures, swap)** | **ja** | |

- Hámarkini eru roknað sum prosentpartur av Minstagjaldføринum.
- Virðisbrøvini verða flokkað í bólkar sambært reglunum hjá Fíggjareftirlitinum.
- Íløgur kunnu gerast í samansetingar av aktivum, um loyvi er at gera íløgur í undirliggjandi aktivini, til dømis íløgufeløg, SPV, CMO ella ETF.
- Um íløga verður gjørd í íløgufeløg við investment grade lánsbrøvum, skulu minst 85% av lánsbrøvunum hava investment grade rating.

| | |
|---|---|
| Til 3 | Partafeløg og íløgufeløg við partabrøvum.<br>Fyri partabrøv (bólk 3) er ein avmarking á 2% sett fyri hvønn einstakan mótpart. Henda avmarking er galdandi fyri beinleiðis íløgu í eitt partabræv og ikki fyri íløgur gjørdar gjøgnum íløgufeløg |
| Til 4.1 og 4.2 | Íløga í ríkislánsbrøv, donsk realkredittlánsbrøv og samsvarandi fastognarlán (covered bonds) í sonu A londum. Í EUR og DKK, annars er neyðugt at kurstryggjað |
| Til 4.3 | Indekslánsbrøv. Í EUR og DKK, annars er neyðugt at kurstryggjað |
| Til 4.5 | Hárentu virkislánsbrøv og menningarlandalánsbrøv eru í hesum bólki. |
| Til 4.6 | Onnur lánsbrøv eru lánsbrøv, sum ikki kunnu flokkast í bólkarnar 4.1-4.5. |
| Til 6 | Peningastovnar. Hámarkið er sett so høgt, tí bólkurin umfatar depotkonti hjá íløgurøktarunum, sum tíðum umleggja frá nøkrum virðisbrøvum til onnur.<br>Í hesum eru tær alternativu íløgurnar, sum ikki kunnu bólkast í øðrum bólkum.<br>Miðað verður ímóti, at alternativu íløgurnar vera millum 10% og 15% av minstagjaldførinum.<br>Bólkurin hedge fondar, infrakervi og aðrar alternativar íløgur kunnu innihalda produkt, sum heilt ella partvís eru derivat. |
| Til 7 | Derivat kunnu nýtast til bólkarnar 3 og 4, um derivatini eru avleidd av partabrøvum ella lánsbrøvum, og hava somu ella líknandi váðaeginleikar sum hesi virðisbrøv.<br>Í bólki 4 kunnu íløgur gerast í aktiuindekseraði lánsbrøv.<br>Somuleiðis kunnu íløgur verða gjørdar í produkt, sum heilt ella partvís eru derivat, innanfyri karmin fyri bólk 6, hedge fondar, infrakervi og aðrar alternativar íløgur.<br>Um onnur sløg av derivatum verða keypt, skal hetta leggjast fyri ráðið. |